Bjørg Hentze

Fra: Fíggjarmálaráðið
Sendt: 22. februar 2023 10:11
Til: Marjun Jacobsen
Emne: Fwd: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort

Sendt fra min iPhone

Start på videresendt besked:

Fra: deyvaradgevin@deaf.fo
Dato: 21. februar 2023 kl. 12.32.45 WET
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Emne: Vedr.: Fw: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort

Hoyringssvar til

Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort

Deyvafelag Føroya ynskir at allur fastur tekstur, ið er frágreiðing um talgilt samleikakort og brúkaravegleiðing til talgilt samleikakort, verður tulkað til føroyskt teknmál, sum er annað av báðum almennum málum í Føroyum.
Eisini ynskja vit, at tað verður ein "lætt lesilig" útgáva av omanfyrinevnda til tey av okkara, ið ikki eru teknmælt, men lesa skrivað mál.

Tit eru vælkomin at venda tykkum til Deyvafelag Føroya

Vinaliga

Christina Johannessen
Deyvaráðgevi
Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10b
Postsmoga 48
FO-110 Tórshavn
Telefon - sms 215324 - 227597
deyvaradgevin@deaf.fo

From: Deaf (deaf@deaf.fo)
Date: 02/02/23 16:16

To: deyvaradgevin@deaf.fo

Subject: **Fw: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort**

Vinarliga

Ingibjørg Jacobsen
Dagligur leiðari
Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
100 Tórshavn
telefon - sms 287597

deaf@deaf.fo

From: Bárður Atlason Ísheim (bardur@megd.fo)

Date: 01/30/23 10:13

Subject: **Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort**

Góðu limafeløg,

MEGD hevur fingið viðhefta uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakortfrá Fíggjarmálaráðnum.

Samleikakortið verður saman við talgilda koyrikortinum partur av appini Skjáttan, sum Talgildu Føroyar í løtuni eru í gongd við at menna.Appin fer at hýsa almenn prógv og loyvi á einum stað.

Endamálið við lógaruppskotinum er at geva talgilda samleikakortinum neyðugu løgfrøðiligu karmarnar, samstundis sum samleikakortið við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda samleikakortið í Føroyum. Øll, sum hava Samleikan, kunnu eisini brúka samleikakortið. Aldursmarkið fyri at fáa Samleikan er 13 ár.

Samleikakortið fer eitt nú at kunna verða brúkt, tá ið tú skal prógva t.d. bústað fyri at fáa avsláttur frá Strandferðsluni ella skal prógva ein ávísan aldur fyri at keypa eina ávísa vøru.

Eftir ætlan verður samleikakortið liðugt ment og klárt at taka í brúk í vár.

Tey feløg, ið ynskja at vera við í hoyringarskrivinum frá MEGD, eru vælkomin at senda uppskot til broytingar ella viðmerkingar til mín í seinasta lagi fríggjadagin 17. februar kl. 11:00. Eisini eru tit vælkomin at ringja til mín á tlf. 527373.

Uppskotið er til hoyringar á hoyringsportalinum hjá Landsstýrinum fram til 21. februar 2023 og hoyringarskriv kunnu eisini sendast beinleiðis tilfmr@fmr.fo í seinasta lagi 21. februar 2023.

Vinarliga

Bárður Atlason Ísheim

Aðalskrivari

MEGD

Íslandsvegur 10C

FO-100 Tórshavn

bardur@megd.fo

Tlf. +298 527373

www.megd.fo